# Triðja tvífløgan við føroyskum dansi útkomin

Herfyri sendi Plátufelagið TUTL triðju tví fløguna í røðini við føroyskum dansi á marknaðin. Dansifelagið í Havn og Tutl tóku stig til at gera føroysku fólkatraditiónina atkomuliga fyri almenningin, bæði í Føroyum og kring heimin. Í fyrsta umfarið verður ein røð við 6 tvífløgum og ein DVD givin út. Við hesari útgávu er verkætlanin komin í helvt. Dansifelagið er í holt við 4. fløguna og tær seinastu koma eftir ætlanini út í fyrru helvt komandi ár. Á nýggjastu útgávuni skipar Niels á Velbastað Jalgrímskvæðið, Høgni Mohr Ormin Langa, Leivur Danielsen Burmand, Jens Jacobsen Gongurolvs-kvæði, Hákun Jacobsen Tróndar kvæði og Sigmund í Hoyvík Hin Føroyski Dansurin. Upptøkurnar hevur Dansifelagið í Havn gjørt í egnum hølum, Gramar hevur sniðgivið húsan og listamaðurin Bárður Jákupsson hevur gjørt kápumyndina. Fløgurnar fáast til keyps runt landið, í TUTL á Káta Horninum og á www.tutl.com

*- kelda: www.vagaportal.fo*






*Danska týðingin av Glansbílætasamlarnur verður skjótt at fáa í Føroyum*

# Jóanes Nielsen framúr gott ummæli í Berlingske

***Glansbilledsamlerne* er frálík frásøgulist, sigur ummælari á Berlingske, ið gevur skaldsøguni hjá Jóanes Nielsen fimm av seks stjørnum**

TÝÐING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

- Við *Glansbilledsamlerne* hevur Jóanes Nielsen gjør eitt hugtakandi broderí av mannalagnum og eigur hann at fáa enn fleiri danskar lesarar, skrivar ummælarin Anne Lise Marstrand Jørgensen í Berlinske Tidende, í sambandi við at skaldsøgan júst er komin út á donskum.

### Frálík frásøgulist

Endaligi dómurin hjá ummælaranum ljóðar soleiðis: »*Glansbilledsamlerne* er ein framúr væl skrivað skaldsøga. Hetta er frálík frásøgulist, eitt komplekst og hugtakandi brodérí av menniskjalagnum. Hetta er ein bók, ið øll eiga at lesa, sum dáma at hvørva inn í bókmentirnar fyri at koma ríkaði upp aftur«.

Hartil vísir Anne Lise Marstrand Jørgensen á, at deyðin er meir enn ein dramatiskur karmur um skaldsøguna. Missurin er ein lívstreyt fyri dreingirnar í søguni. Kring teir gera fólk sjálvmorð, drekka seg hálvavegna í hel, drukna, gerast sinnisjúk og verða send burtur fyri ongantíð at koma heim aftur. Í einum samfelag, sum er so lítið, at øll kenna øll, goymir man síni loyndarmál uttan at kunna fjala tey. Hetta er eitt rátt samfelag, har lívsviljin verður skerdur av ómøguligum korum. Men tað er eisini eitt samfelag av stoltum og treiskum viljum, av menniskjum, sum royna at ganga uttan um normarnir fyri hóast alt at kunna taka sær av hvørjum øðrum.

Tað er forlagið Torgard, sum hevur givið út donsku týðingina av *Glansbílætasamlarnir*

Povl Skårup hevur týtt bókina til danskt.

# Ungir sjónleikarar til India

**Ein bólkur av ungum leikararum úr Sjónleikaraskúlanum fáa nú høvi at vísa síni kynstur á stórum sjónleikafestivali í New Dehli**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Sjónleikaraskúlin hjá Havnar Sjónleikarafelagi fer í næstum á sjónleikarafestival í Delhi í India at framføra sangleikin "Fez" eftir hollendska rithøvundan Marcel Van Rijn. Festivalurin verður í døgunum 27. november til 1. desember 2008.

### Millum altjóða bólkar

Festivalurin "9th International childrens Festival og Performing Arts" verður hildin



*Frá sangleikinum „Fez" sum ungir føroyskir sjónleikarar fara at framføra í New Delhi í næstum*

á hvørjum ári. Einir 20 altjóða bólkar eru valdir út at framføra, umframt út við 50 indiskir bólkar. Luttakarar koma frá Iran, Pakistan, Uganda, Týsklandi, Litava og nógvum øðrum londum. Hetta er eitt tað besta høvið hjá sjónleikaraáhugaðum børnum kring allan heim at hittast og framføra.

Sjónleikaraskúlin er eitt samstarv millum sjónleikarhúsið og kvøldskúlan, har eini 60 børn og ung fáa frálæru. Børnini eru bólkaði eftir, hvussu leingi tey hava gingið til sjónleik, og tey kunnu halda fram so leingi tey eru í fólkaskúlaldri. Seinastu tvey árini hevur skúlin staðið fyri „Leikhúsjól" í Sjónleikarhúsinum, og teir næmingar, sum nú fara til India, hava gingið fleiri ár í sjónleikaraskúlanum, og hava tí drúgvar royndir í at spæla alment.

### Leikurin

Leikurin "Fez", sum bólkurin fer at framføra, snýr seg um sjómenn, sum fara út í verðina og vitja í tí fremmanda Turkalandi. Ein av matrósunum verður illa happaður, men tá ið hann fær hendur á einum gandahatti (fez) sleppur hann sjálvur at royna, hvussu tað er at vera leiðari og fyrimynd. Hann finnur tó skjótt út av, at vinalag er meira enn vald og pengar.

Sum reyður tráður í leikinum, er gandahatturin (fez´in) mynd av tí , sum øll tráa eftir, men sum ikki gevur eydnu hóast alt. Sangleikurin verður framførdur við ungdómsorkestrinum "Bendar Spónir" á pallinum. Evnini í leikinum gera leikin væl egnaðan til hendan altjóða festivalin, har altjóða samleikin og fatan av ymsum mentanum eru á skránni.




*Hóast hon fekk heldur torføra byrjan, er bókin um moldvørpuna nú komin út í meira enn trimum milliónum eintøkum*

# Kultbók um kukkar

**Kenda kultbókin um moldvørpuna, sum vildi vita, hvør hevði kukkað í høvdið á sær, er nú komin á føroyskum**

BÓK

Søgan er um moldvørpina, sum ein dagin vaknar og hevur ein kukk á høvdinum. Hon vil sjálvandi vita, hvør hevur gjørt hesa dáragerð, og fer at spyrja seg fyri hjá ymsum djórum. Lesarin fylgir við í prøvførsluni, sleppur at síggja munin á lortum og endiliga at finna syndaran.

Bókin kom fyrstu ferð út í Týsklandi í 1989, eftir at rithøvundurin leingi hevði roynt at fingið eitt forlag at geva hana út. Hon fekk misjavna móttøku; forløg vístu hana frá sær, tí tey vóru samd um, at slíka bók fór ongin bókhandil at selja. Kanska onkur úr 68´ara ættarliðinum fór at keypa hana, men tað var eisini alt! Als ikki nøkur barnabók, vildu summi vera við.

Tá ið rithøvundurin hevði roynt í tvey ár at fáa bókina út, var tað endiliga eitt forlag, sum hevði dirvi at geva hana út. Restin er ein sólskinsøga: Bókin er seld í meira enn trimum milliónum eintøkum á nú 28 ymsum málum.

Umframt at vera ein myndabók fyri børn er bókin eisini vorðin ein sokallað kultbók, sum bæði ung og vaksin hava fragd av.

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út myndabókina „Um lítlu moldvørpina, sum vildi vita, hvør hevði kukkað í høvdið á sær"

Tað er Werner Holzwarth sum hevur skriva skemtiligu bókina og Wolf Erlbruch myndprýtt. Niels Jákup Thomsen týddi úr týskum. Bókin er 22 blaðsíður og innbundin.

**ave**